## Tínar treytir fyri NordikSolo

NordikSolo er okkara fyrimunaskipan fyri kundar millum 18-28 ár. Tá ið tú gerst limir í NordikSolo, fært tú atgongd til Solopakkan, har vit hava savnað tær bestu tænasturnar, ið gera tað lættari hjá tær at hava yvirlit yvir tíni fíggjarviðurskifti. Harafturat fært tú ein persónligan ráðgeva, ið tú altíð kanst seta teg í samband við, um tær tørvar ráðgeving. Tú kanst lesa meira um allar fyrimunirnar á banknordik.fo/nordiksolo.

Ert tú millum 18 og 28 ár og uppfyllir hesar treytir, verður tú sjálvvirkandi limir í fyrimunaskipanini:

- Tú hevur lønarkontu/Nemkontu í BankNordik, ið er knýtt at Netbanka
- Øll tín løn ella studningur kemur inn á lønarkontuna

Bankin meldar teg til fyrimunaskipanina. Tá ið tilmeldingin fær virknað, verður tú sjálvvirkandi fevnd/ur av teimum rentutreytum og prísum, ið eru gladandi fyri NordikSolo.

**Luttøka í fyrimunaskipanini er tíðaravmarkað**
Tú ert fevnd/ur av fyrimunaskipanini til tann dagin, tú gerst 29 ár. Tá ið luttøkan í fyrimunaskipanini endar, fella fyrimunirnir, ið tú hevði í fyrimunaskipanini, burtur. Eftir hetta verður tú fevnd/ur av okkara vanligu privatkundatreytum, ið tú kanst lesa meira um í okkara prísbók, ið altíð liggur dagførd á banknordik.fo/prisir.

Tú kanst til hvørja tíð siga teg burtur úr fyrimunaskipanini uttan freist. Útmelding úr fyrimunaskipanini skal sendast BankNordik skrivliga og fær gildi, tá ið hon er skrásett í bankanum.

**Broyting í fyrimunaskipanini og prísbroytingar**
Bankin kann seta í verk nýggjar fyrimunir uttan freist. Aðrar broytingar í fyrimunaskipanini umframt broyting í prísum og fyrimunum verða fráboðaðar í samsvari við vanligu viðskiftatreytir bankans.

**Aðrar treytir**
Luttøka í fyrimunaskipanini er treytað av, at bankin støðugt kann upplýsa um galdandi fyrimunir umframt møguligar nýggjar fyrimunir í fyrimunaskipanini ella øðrum viðkomandi tænastum hjá BankNordik-samtakinum. Kunningin kemur t.d. umvegis SMS-boð, teldupost ella Netbankan.

Vanligu viðskiftatreytir bankans eru galdandi fyri fyrimunaskipanina.